Meiri pengar til mentanina

Meiri pengar skulu á borðið til mentan og vit skulu hava meiri mentan fyri pengarnar. Verða tilmælini og uppskotini í nýggja mentunarálitinum, Mentan og menning, framd í verki, kunnu vit rokna við eini mentunarkollvelting í Føroyum, tá ið snýr seg um skapandi og útinnandi list

MENTANARÁLIT
Turið Kjølbro

Týsdagurin 5. mars 2002 er ein stórur dagur fyri skapandi og útinnandi list í Føroyum. Hetta var dagurin, tá ið mentunarpolitiska ætlanin 2002-2006, sum hevur fingið heitið Mentan og menning og sum bíðað hevur verið eftir so leingi, varð løgd fyri føroyska almenningin og fyri tingið. Á eini slíkum degi eru orðini stór og føgur, ætlanirnar nógvar og pengarnir - í uppskoti - somuleiðis, og verður, sum í álitinum er mælt til, fær skapandi og útinnandi listin í Føroyum ikki bara karmar og mennandi virkiskor, men eisini tvær eina hálva ferð so nógvar pengar, sum hon fær í dag.

Álitið, sum embætisfólk í Mentamálastýrinum í høvuðsheitum hava staðið fyri, er skrivað til politikarar, játtanarmyndugleikar, listarliga umhvørvið og almenningin. Endamálið er, at vit skulu vita, hvør mentanarpolitikkur skal rekast komandi árini. Munurin á nýggja mentanarálitinum og teimum báðum undanfarnu frá 1972 og 1996, er, at hetta er ógvuliga ítøkiligt. Nýggja álitið byggir á ta undanfarna, Avmarkaðan marknað, men er meiri ein dagføring og mælir ítøkiliga til, hvussu málini, sum skotin verða upp, kunnu røkkast og setast í gongd. Eisini eru kostnaðarmetingar.



Í álitinum eru uppskot um, hvussu mentanarpolitikkur kann setast í verk og metingar um, hvussu nógv hann fer at kosta fram til ár 2006. Á myndini Petur Petersen, aðalstjóri, og Óli Holm, landsstýrismaður

Mynd: Jens K. Vang

Berandi

Í høvuðsheitum byggir mentanarpolitikkurin, sum skotin verður upp í álitinum, á tveir aðalhyrnisteinar, nevniliga ein umskipaðan Mentunargrunn Landsins og á uppskot um at skipa listøkið við listaráðum. Mentunargrunnurin skal enn sum áður vera flaggskipað, tá ið umræður útinnandi list, men hann skal umskipast til ein lista-, mentanar-, og filmsgrunn, og játtanin til grunnin skal økjast munandi. Grunnurin fær í dag 3 mió. krónur, og skal sam bært álitinum ráða yvir 9 mió. krónum í 2006.

Vit eiga nógv gávurík og virkin listafólk, staðfestir álitið. Tí ræður tað um at tryggja list og listafólkum góðar karmar og mennandi virkiskor. Á myndini Jóannes Dalsgaard, deildarstjóri í Mentamálastýrinum

Mynd: Jens K. Vang

Umframt verður skotið upp at lata pengarnar, sum Mentamálastýrið veitir ymsum endamálum, til mentanarlívið gjøgnum løgtingslóg um stuðul til list og listarligt virksemi. Skipast skulu listaráð umboðandi allar listagreinirnar við tí endamáli, at listagreinirnar verða mentar. Eitt mentanarráð, har fólk, ið umboða ymsu ráðini, skal eisini setast.

- Hetta skal verða eitt kjakforum, umframt at ráðið skal gera tilmæli til landsstýrismannin við mentamálum, sigur Óli Holm.

Listafólkasamband Føroya, ið í ár hevur 20 ár á baki, fær eisini høga raðfesting í álitinum. Sambært álitinum skal samgongan av listafeløgum styrkjast munandi, eisini við hægri játtan, og skrivstovan hjá felagnum skal gerast til eina tænastu og ráðgevingarmiðstøð hjá føroyskum listafólkum.

Stuðla ikki stýra

Í álitinum eru hópin av møguleikum fyri, at góðir karmar verða skaptir fyri skapandi listina í Føroyum. Á tíðindafundinum týsmorgunin legði deildarstjórin í Mentamálastýrinum, Jóannes Dalsgaard, stóran dent á, at meginreglan armslongd, sum ein franskur mentamálaráðharri kom við, eisini verður staðfest í Føroyum. Hendan meginreglan er galdandi fyri mentanarpolitikk í flestu fólkaræðiligum londum og merkir, at tað almenna skal stuðla mentanarlívinum uttan at stýra tí.

- Í minsta lagi ein armslongd eigur at vera millum politiska valdið og mentunarliga virksemið, sigur Jóannes Dalsgaard.

Álitið leggur eisini upp til størri samvinnu millum mentan og vinnulív, og á eitt økt samstarv millum listaøkið, kommunur og lokalsamfeløg. Til samanberingar kann nevnast, at meiri enn helmingurin av pengunum, ið donsk listafólk verða stuðlað við, koma frá kommunum og amtum.

Uppfylgjandi

Mentan og menning røkkur bert um tann partin av mentanarpolitikkinum, ið snýr seg um skapandi og útinnandi list. Tískil er ætlanin, at fylgt verður upp við menningarætlanum fyri aðrar partar av mentanarpolitikkinum, eitt nú varðveiting av mentanararvinum, ítróttini, mentanartiltøk fyri børn og ung, og annað. Arbeitt hevur verið við álitinum, Mentan og menning, í fýra ár undir fýra landsstýrismonnum við mentamálum. Fleiri hoyringarfundir hava verið, og listafólk og listarliga umhvørvið í Føroyum hava havt stóra ávirkan á endaliga úrslitið. Tí er nýggja álitið besta grundarlagið, vit enn hava sæð, tá ið tað ræður um at skapa karmar fyri útinnandi list í Føroyum.

- Ætlanin er, at tá ið fimm ár eru farin, skal mentanarpolitiska ætlanin endurskoðast fyri at finna út av, hvat er rokkið og hvat síðan skal gerast, sigur Óli Holm.

Um tað ikki er óheppið, at álitið kemur so seint í einum valskeiði, sigur landsstýrismaðurin við mentamálum.

- Mentanarpolitikkur hyggur frameftir. Tað er eitt stórt stig, at álitið er komið, og tilmælini og uppskotini í álitinum, meti eg, eru tiltøk, sum eiga at fáa breiðan politiskan stuðul, sigur Óli Holm.

Landsstýrismaðurin við mentamálum leggur upp til, at ein virkin og miðvísur mentanarpolitikkur verður rikin, sum hevur breiða undirtøku á tingi og í almenninginum. Hvørja undirtøku álitið fær, fáa vit at vita í næstu viku, tá ið aðalorðaskifti verður um ætlanina.

24 mió. krónur til listaøkið

MENTANARÁLITIÐ
Turið Kjølbro

Skal mentunarpolitikkurin, sum mælt verður til í nýggja álitinum Mentan og menning, eydnast, skal játtanin til skapandi og útinnandi list í minsta lagi verða so stór sum álitið leggur upp til. Tiðarskeiðið, virksætlanin fevnir um, er fimm ár og á hvørjum ári skulu ymsu játtanirnar økjast. Skotið verður upp, at játtanin til Mentunargrunn Landsins verður økt við 30 prosentum um árið, úr 3 mió. í dag til 9,8 mió. krónur í 2006. Til mentanarsamstarv í Útnorði verður mælt til at økja játtanina úr 250.000 til 532.000 krónur, og til norðurlendskt mentanarsamstarv úr 250.000 krónum til 499.000 krónur í 2006. Listafólkasambandið skal hava 512.000 krónur í 2006 í mun til 250.000 krónur í dag, leiklistin skal hava slakar 8 mió. krónur um fimm ár í mun til 2,8 í dag. Myndlistaráðið og bókmentaráðið skulu hvørt ráða yvir hálvari mió. krónum um fimm ár, og tónlistaráðið, ið í dag ræður yvir 750.000 krónum, skal ráða yvir 2,3 mió. í 2006. Onnur øki, so sum altjóða samstarv og mentanarpolitisk endamál, skulu hava slaka hálva aðru mió. krónur at arbeiða við í 2006. Samanlagt verða játtanarkarmarnir til listaøkið mettir at verða góðar 24 mió. krónur í 2006 í mun til 9,3 mió. krónur í dag.

BRÚKARATEIGUR

Hárliting

Spurningar og svar um hárliting

Rigmor Dam

Eru ávís sløg av kemiskari hárliting betur enn onnur?

Brúkararáðið í Danmark hevur skrásett 76 fólk, sum hava fingið skaða av at lita hárið. Merkini, sum tey høvdu nýtt, vóru Henkel, LÓreal, Wella og Goldwell, og umboða hesi merki nærum allan danska marknaðin av kemiskari hárliting. Brúkararáðið viðmælir tí onga kemiska hárliting.

Hvussu sæst, at talan er um kemiska hárliting?

Í hárliting, sum ikki kann vaskast úr, eru ofta illgrunaverd kemisk evni, so sum phenylendiamin, resorcinol, toluen 2,5 diamine. Um litingin er av tí slagnum, har tvey ymisk evni skulu blandast saman, er allarhelst talan um kemisk evni.

Er alt í lagið, um eg ikki reageri uppá allergiroyndina, sum stendur í brúkaravegleiðingini?

Allergiroyndin er eingin trygd í sjálvum sær. Tá mælt verður til at bíða í 48 tímar, fyri at vita um tú reagerar negativt, so er tað ikki nóg mikið. Húðlæknar meina, at tað kunnu ganga upp í átta dagar, áðrenn vit bróta út.

Er vandi fyri ovurviðkvæmi, tá eg altíð havi nýtt sama merkið av hárliting?

Vandin fyri ovurviðkvæmi minkar ikki av at nýta sama merkið altíð. Hetta kemst av, at ovurviðkvæmi verður bygt upp í kroppinum og kann bróta út nær sum helst.

Kann hárliting skaða ófødda barnið, um eg eri við barn?

Brúkararáðið vísir ikki aftur, at evnini frá hárliting kunnu fara út í blóðið, tí fleiri teirra eru eitrandi og verða upptikin gjøgnum húðina. Av tí at blóðið eisini kemur til ófødda barnið, eigur tú ikki at lita hárið, tá tú ert við barn. Um tú kortini ynskir at lita hárið, er best at nýta hárliting,ið leggur seg sum ein hinna um hvørt hárið. Slík liting er øðrvísið enn tann, sum verður blandað við hydrogenperoxid, og sum treingir inn í hvørt hárið.

Er tað vandamikið at strípa hárið?

Brúkararáðið hevur staðfest bæði ovurviðkvæmi hjá nógvum fólki og at hárið er dotti av, eftir at tey hava strípað sær. Brintoveriltan í sjálvum sær gevur ikki ovurviðkvæmi, men viðhvørt hava evnini, til at strípa hárið við, eisini litevni í. So sannlíkt er, at tað er litevnið, sum gevur ovurviðkvæmi.

Er tað tryggari at lita sær hjá frisørinum?

Nei, tað er ikki tryggari at lita sær hjá frisørinum. Øll sløg av kemiskari hárliting eru trupul, hvat ovurviðkvæmi viðvíkur, tað verið seg Wella og Goldwell frá frisørinum og Henkel og LÓreal til at nýta heima.

Eru aðrir valmøguleikar enn kemisk hárliting?

Plantuhárliting er ein annar møguleiki. Plantuhárlitingin leggur eina hinnu um hvørt hárið, meðan kemiska litingin treingir inn í sjálvt hárið. Tó er neyðugt at kanna um hárliting, sum til dømis henna, inniheldur evni Lawsone, sum er undir illgruna fyri at vera krabbaelvandi. Spyr í handlinum um tey hava plantuhárliting, sum ikki inniheldur Lawsone.

Kelda: Danska Brúkararáðið

Timeshare-fyritøkur meldaðar til løgregluna

Timeshare-fyritøkur lumpað svensk ferðafólk í Spania

Rigmor Dam

Konsument Europa, sum er ein partur av svenska brúkararáðnum, hevur fingið nógvar klagur um timeshare-fyritøkur og frítíðarklubbar, sum hava lumpað svensk ferðafólk í Spania.

Hesar fyritøkur eru tiltiknar harðrendar, tá tær skulu marknaðarføra seg sjálvar. Fleiri teirra selja eigarapartar til íbúðir, sum ikki eru til, og aðrar múgva seg upp við at bjóða fólki at selja íbúðir, sum tey longu hava keypt. Fyritøkan setir seg í samband við eigaran og bjóðar honum at selja íbúðina, um hann rindar eitt ávíst gjald forút.

- Tá peningurin er fluttur á kontoina hjá teimum, sum hava sagt seg vilja selja íbúðina, ber ikki til at koma í samband við tey aftur. Tí ráði eg øllum til at takka nei til slík tilboð, óansæð hvussu dámligur ella fryntiligur persónurin í telefonini tykist vera, sigur Agneta Gillback, stjóri hjá Konsument Europa.

Konsument Europa hevur hjálpt nógvum fólkum úr klørnum á timeshare-fyritøkum. Men nú verður farið víðari, og fyritøkurnar verða tí meldaðar til løgregluna í Svøriki og/ella Spania. Higartil eru hesar fyritøkur meldaðar: Skandinavisk Feriecenter (La Quinta Sales och Ocean Ridge), Trend Properties, Property Transfer, Property Partner, Platinum Properties, Continental Marketing Consultants och Dinastia Resort.

Kelda: Svenska Konsumentverket

Teir 'veiku' stólarnir eru teir bestu

Rigmor Dam

Ein babysittari (skrástólur) skal ikki vera sum ein abbastólur, við fótskamli og oyraklaffum, tí so fær barnið ikki rørt seg frítt. Ein polstraður og makligur stólur leggur upp til, at barnið verður sitandi alt ov leingi.

- Eitt barn, ið situr ov leingi í babysittara, fær skeivt høvd og skeivan nakka, sigur heilsusysturin Else Guldager, í samband við at 12 babysittarar og bilbarnastólar eru kannaðir av danska stovninum Forbrugerinformation.

Heilsusysturin metir, at tað eru teir løttu og bíligu babysittararnir, ið danda, sum vit eiga at velja - fram um teir dýru lenistólarnar, sum kunnu broyta sitistøðu og annað 'raffinerað'.

Stólurin skal kortini vera sterkur og ikki hava hvassar kantar ella sprekkur at klemma smáu fingrarnar í. Hann skal ikki hava nakað dingl, sum barnið kann fáa í munnin, og lásið skal kunna halda barninum. Ikki allir teir kannaðu stólarnir luku hesi krøv.

Tað vóru ikki álvarslig brek á stólunum, men okkurt var heldur óheppið, so sum at onkur stólur mundi koppað ella gliðið, og at honkin ofta datt av. Innflytararnir av hesum stólum hava sagt seg vilja bøta um hesar trupulleikar.

Av teimum løttu babysittarunum, sum danda og sum einans hava eina situstøðu, var tað Ikea Finurlig, sum fekk besta skoðsmálið, tá talan var um prís og góðsku. Av teimum størru stólunum, við fleiri sitistøðum, var Chicco lux tann, sum best livdi upp til krøvini um trygd, haldgóðsku og støðufesti.